

*Hendan eftirgjørda myndin vísir, hvat málið snýr seg um. Myndin er úr Hovi og holið uppi í fjøllunum høgrumegin er tunnilin, sum landsverkfrøðingurin hevur skotið upp at gera. Holið vinstrumegin tunnilin, sum NCC kann gera. Hesin tunnilin er niðri í dalinum og liggur nógv betri fyri. Tað er ábyrgdarleyst ikki at gera hendan tunnilin, sigur ein stórur meiriluti av vinnunevndini hjá løgtinginum*

# Suðuroyingar fáa tað sum teir vilja hava tað

**Og spara samstundis landskassanum 45 milliónir og tað er óforsvarligt ikki at taka av tilboðnum, sigur meirilutin hjá vinnunevndin hjá løgtinginum**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

**Suðuroy:** Arbeiðið at gera nýggja samferðsluhavn í Trongisvági og arbeiði at gera tunnil ímillum Øravík og Hov, skulu tengjast saman.

– Og tunnilin skal vera gjørdur eftir uppskotinum, sum norska felagið NCC hevur boðið sær til at gera og sum er nógv betri enn tann, sum Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp at gera.

Alt annað er ábyrgdarleyst, sigur meirilutin í vinnunevndini hjá Løgtinginum.

Vinnunevndin hevur havt langa og nágreiniliga viðgerð av uppskotinum um at gera samferðsluhavn í Trongisvági og nú hon hevur lagt úrslitið fyri tingið aftur, er ein stórur meirilutin av henni sinnaður at ganga ynskjunum frá Suðuroyingum á møti.

## Tengja arbeiðini saman

Samstundis, sum ætlanin hevur verið at gera nýggja samferðsluhavn, hevur verið tosað um at gera tunnil ímillum Øravík og Hov.

Landsverkfrøðingurin hevur skotið upp at gera tunnilin uppi í hæddini, tí hann vil leggja hann har ið jarðfrøðiligu viðurskiftini eru tey bestu. Í sambandi við hendan tunnilin skulu 4,2 kilometrar av nýggju mvegi gerast og tá slepst heldur ikki undan tí ringasta strekkinum á leiðini, tí tað er brekkan úr Hovi, niðan á Millíónsvingið.

Men hesa loysnina hildu suðuroyingar lítið um.

Tað fekk Petur Hammer at venda sær til NCC, sum gjørdi Vágatunnilin, at spyrja teir, um tað bar til at gera tunnilin niðri í dalinum í Hovi. Tá slepst undan øllum brekkunum og allari vegagerðini. Afturfyri verður tunnilin væl bíligari.

NCC sigur, at tey hava so góða útgerð, at tað er ongin trupulleiki. Og verður so arbeiðið upp á tunnilin tengt saman við arbeiðnum at gera nýggja samferðsluhavnina, kunnu einar 15 milliónir sparast við at taka grótið til samferðsluhavnina úr Tunlinum, heldur enn at keypa tað úr einum grótbroti.

Hetta eru tey viðurskiftini, sum vinnunevndin hevur viðgjørt. Og tað hevur tikið sína tíð, tí vinnunevndin hevur viðgjørt málið á 13 fundum og tað hoyrir avgjørt til undantøkini, at mál fáa so drúgva viðgerð.

Samstundis hevur nevndin havt fund við øll hugsandi fólk, ið hava eina meting um málið, eitt nú landsverkfrøðingin, NCC, fylgibólkin ið fylgir við arbeiðnum at gera samferðsluhavnina, jarðfrøðisavnið, landsstýrismannin í vinnumálum og onnur við.

## Óforsvarligt

Meirlutin hjá vinnunevndini, sum er Henrik Old, formaður úr javnaðarflokkinum, Heini O. Heinesen og Olaf í Garði Joensen úr tjóðveldisflokki, Alfred Olsen og Kaj Leo Johannesen úr sambandsflokkinum, og Gerhard Lognberg úr javnaðarflokkinum, at tað er óforsvarligt ikki at knýta verkætlanina at byggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði, og verkætlanina um tunnil millum Øravík og Hov, saman í eina verkætlan.

– Verður grótið til samferðsluhavnina tikið frá tunlinum, heldur enn at keypa tað frá einum grótbroti, kunnu umleið 15 mió kr. verða spardar.

– Harumframt kann nógv verða spart í koyring í sambandi við tunnilsverkætlanina, um grótið verður koyrt beinleiðis frá tunlinum til samferðsluhavnina, heldur enn at skula koyra tað frá tunlinum til goymslu.

Umboð fyri NCC hava enn einaferð váttað fyri vinnunevndini, at tey kunnu gera tunnilin ímillum Øravík og Hov við eini linjuføring, ið fólk á staðnum verða nøgd við, við tað at hon liggur munandi lægri í landslagnum enn tann, ið landsverkfrøðingurin hevur skotið upp. Og øravíkarmegin kemur tunnilin út nógv nærri ætlaðu samferðsluhavnini á Trongisvágsfirði.

– Harafturat er greitt, at tá ið vegagerðin er tald uppí, verður hesin tunnilin einar 30 milliónir bíligari enn tunnilin, ið landsverkfrøðingurin hevur skotið upp at gera.

Og tá ið 15 milliónir kunnu sparast upp á grótið, kunnu sostatt einar 45 milliónir sparast við at knýta hesar báðar verkætlanir saman.

– NCC sigur at tað kann byrja arbeiðið upp á tunnilin uttan stórvegis forkanningar. Og vil landið ikki átaka sær vandan fyri, at arbeiðið verður dýrari enn væntað orsakað av væntandi forkanningum, kann arbeiðið gerast fyri fastan prís.

– Hetta merkir so sjálvsagt eisini, at landið ikki fær fyrimunin, um arbeiðið verður bíligari enn væntað.

Men nevndin leggur dent á, at hetta skal á ongan hátt skiljast soleiðis, at arbeiðið ikki kann verða boðið út.

– Verður farið undir arbeiðið alt fyri eitt, kann tunnilin vera komin ígjøgnum og vera fult tryggjaður áðrenn næsta summar.

Men møguleiki er so eisini ikki at tunnilin heilt lidnan men at bíða við at asfaltera og at seta ljós og trygdarútgerð upp, til játtan fyriliggur til hetta. Herví̇ð kunnu á leið 20 mió kr. sparast fyribils.

## Kanska eitt sindur seinkað

Vinnunevndin hevur eisini tosað um, hvussu ein slík, stór verkætlan kann fíggjast. Og ein møguleiki er at arbeiðið verður gjørt yvir eitt stutt tiðarskeið, men at fíggingin verður strekt yvir longri tíð.

– Við hesum upplýsingum kann vinnunevndin ikki góðtaka, at grótið til samferðsluhavnina verður tikið úr einum grótbroti.

Og so heldur nevndin, at tað hevur ikki avgerandi týdning, at samferðsluhavnin verður liðug samstundis sun nýggja suðuroyarskipið er liðugt, men verður nakrar mánaðir seinkað.

Men fyri at tryggjað, at farið verður rætt fram, mælir meirlutin í vinnunevndini til, at verklagslógin um samferðsluhavnina í Trongisvági verður broytt soleiðis at tað beinleiðis kemur at standa í henni, at »Grótið til samferðsluhavnina verður tikið úr tunlinum Øravík – Hov«.

Ein minniluti í nevndini, sum er Heðin Zachariasen úr fólkaflokkinum, tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið uttan broytingar.

# Guðrun hevur tað strævið á toppinum

**Hon fer at gera, hvat hon kann, fyri at sleppa undan at flyta av landinum, tí familjan, vinirnir og heimbygdin eru ov góð at fara frá, sigur hon**

STJØRNA
*Áki Bertholdsen*

Nú er veitslan liðug og nú er tað harða arbeiðið byrjað.

Í gjáramorgunin fór Guðruni Jacobsen av aftur landinum. Men at fáa tíðina at ganga verður ongin trupulleiki, tí alla møguliga staðni er gravgangur eftir at fáa hana at syngja.

Vit hittu Guðruna eina løtu seint mikukvøldið ímeðan hon fekst við at pakka sær kuffert at hava við.

Nógv er sagt og skrivað um sjálva kappingina, sum Guðrun vann, so tað lata vit liggja hesuferð.

Ístaðin hava vit spurt hana, um hon veit nakað um, hvussu framtíðin hjá henni sær út, nú hon er blivin eitt tað kendastra andlitið í øllum ríkinum.

Men tað veit hon lítið og onki um enn. Tað einasta, hon veit, er at hon verður smábýtt teir næstu mánaðirnar, tí tað er sannur gravgangur eftir at fáa hana at syngja alla møguleika staðni.

Men hon veit eisini, at hon ætlar sær at taka av hesum møguleikanum, hon hevur fingið og so má skúli og alt annað víkja, um neyðugt.

Hetta er tað, hon hevur droymt um og hon vil ikki sita 50 ára gomul og iðra seg um, at hon ikki leyp í vaðið og gjørdi sítt besta, tá ið hon fekk møguleikan. Hon er ung og leys og skal hon taka ein kjans her í lívinum, skal tað vera nú.

– So fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur. Men í øllum førum skal eg kunna siga aftaná, at eg tók av møguleikanum, eg fekk.

Men hon dylir heldur ikki fyri, at tað besta hevði verið at hon eisini fekk studentaskúlan frá hondini. Hon manglar tríggjar mánaðir av skúlagongdini og hon sigur, at framvegis verður arbeitt fyri at finna onkra loysn, so at hon kortini kann fara til próvtøku í ár. Men tað er ikki vist at tað eydnast. Tað einasta, sum er vist, er, at tað verða ikki stórvegis stundir til at ganga í skúla.

## Av tilvild

Men fyrst fara vit eitt sindur aftur í tíðina og spyrja hana, hvussu tað yvirhøvur bar til, at hon endaði í hesi kappingini.

Og tað var mestsum av berari tilvild, sigur hon.

– Ein lærari, eg hevði í týskum, hoyrdi meg syngja á eini jólaveitslu. Aftaná kom hann til mín og helt, at eg átti at melda megf til "Stjerne for en aften".

Tá ánaði Guðrun ikki, hvat tað var fyri nakað. Men seinni kom eisini ein kona, sum hon spælir í hornorkestri við, og segði tað sama. Og uppaftur seinni kom so ein afturat.

Hetta vakti hennara áhuga.

Sangin, "Promise Me" hevði leiðarin fyri gospelkórinum, funnið fyri hana, tí hann helt, at hann riggaði so væl til Guðruna. Men tað var ikki til hesa kappingina at sangurin var funnin, tað var til eina aðra framførslu, sum kortini var av ongum.

Men hon gjørdi so av, at hon skuldi royna seg í kappingini við hersum sanginum.

Ein lærari í Vági hjálpti henni so at gera ein fløgu at senda til upptøkunevndina hjá Danmarks Radio og tekniska útgerð var Útvarp Føroya so beinasamt at lána teimum.

Fløgan varð send til Danmarkar. Guðrun kom við í kappingina og restina av søguni kenna vit øll.....

## Ikki droymt um

Nú nakrir dagar eru gingnir síðani tann minnisríka finalu - fríggjadagin, hevur hon enn ikki rættiliga fatað, hvat er hent.

– Hetta kom sum eitt skot. Og til tíðir er tað ræðuliga strævið, tí tað er so nógv, eg skal gera alla tíðina.

Higartil hevur mítt lív ligið í eini fastari rútmu. Tað hevur verið skúlin so heim og í song um kvøldið og so umaftur dagin eftir. Nú havi eg ikki stundir at vera undir taki og tað eru fimm sekund ímillum at telefonin ringir.

– So tað tekur sína tíð at venja seg til. Men tá ið eg sigi, at tað er strævið, er tað ikki so illa meint, tí tað er eisini stuttligt og spennandi og eg taki tað heilt avgjørt ikki illa upp, at fólk eru áhugað og ringja til mín, vitja meg, biðja um autograf o.s.fr.

Men nú hevur Danmarks Radio givið henni ein professionellan fyriskipara - manager - í eitt hálvt ár og tað er hann sum leggur alt til rættis.

Tað er fyri at halda skil á øllum og at syrgja fyri, at Guðrun ikki kemur sær í óføri. So nú gongur alt ígjøgnum hendan fyriskiparan og hann leggur so alt til rættis.

Men tá ið fólk ringja til hennara, er tað eisini ringt hjá henni at vísa til fyriskiparan alla tíðina.

– Onkusvegna haldi eg, at tað ljóðar so hástórt av mær at vísa til ein fyriskipara. Eg eri bangin fyri, at nú fara fólk at siga, at eg haldi meg vera. Hetta liggur slett ikki til mín og eg vóni ikki, at eg nakrantíð komi at ljóða um primadonna. Eg vil fegin blíva verandi tann, eg eri og varðveita tey vinfólk eg havi. Tað er umhvørvið, ið eg eri sprottin úr, sum hevur gjørt meg til tann, eg eri, og tað vil eg ikki bróta við, sigur Guðrun.

Men skal ikki fløkja koma í alt, er tað neyðugt at hava ein fyriskipara. Tí eg dugi ikki ordiligt. Tað verða ov nógv "kanska" og "vissi tað liggur fyri". Tað er ringt at skera ígjøgnum og tí er tað øgiliga gott at hava ein fyriskipara, sum heldur skil á øllum fyri meg.

Hon sigur, at hon hevði ikki kunna ímynda sær allan ehndan hávan í bleiv av kappingini.

– Tá ið eg meldaði meg til kappingina vónaði eg, at kanska onkur fekk eyga á meg og kanska eg fekk møguleikan at royna meg í onkrum kóri, ella okkurt sovorði.

Ístaðin fyri at fáa møguleikan í einum kóri, endaði tað við, at hon, meiri enn nakað annað, megnað iat savna alla føroysku tjóðina, bæði burturi og heima og at blíva eitt tað kendasta navnið í ríkinum.

– Tað er ein deilig kensla. Og tað er vælsignað at hava fingið okkurt positivt at hugsa um í hesum døpru tíðum

## Finalistar til Føroya

Men hvat fyriskiparin hevur í skjáttuni til Guðruna, veit hon ikki so nógv um enn.

Men konsertferðin byrjar longu í dag, tá ið Guðrum skal syngja á tveimum tiltøkum.

– Síðani skal eg syngja á einum stórum vælgerðandi tiltaki í Forum, til frama fyri krígsoffrini í Irak. Har fer hon at syngja "Hero" og har verða mong onnur av fremstu tónleikarum í Danmark við, eitt nú Sanne Salomonsen.

Annars hevur tað verið lýst, at hon skal syngja í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið, men tað er ein misskiljing.

Sunnudagin fær hon kanska frí, men mánadagin verður aftur lagt til brots.

Men tað er eisini talan um at skipa fyri eini konsertferð til Føroya við summum av teimum, sum vóru við Guðruni í finaluni.

Eitt nú er ætlanin at Jacob Andersen, sum var nummar tvey, skal við á Føroyaferðini og somuleiðis Martin Petersen og kanska verður onkur annar eisini, men tað er ikki heilt greitt enn.

Hinvegin liggur ikki fyri hjá Tarek at koma.

Enn er ikki heilt greitt, nær konsertin í Føroyum verður, men ætlandi verður hon einaferð í næsta mánað.

Annars skal hon syngja víða hvar í Danmark hesa næstu tíðina.

Eisini skal hon spæla fløgu inn fyri heimsins størsta plátufelag, Universal, sum eisini Teitur Lassen hevur sáttmála við.

Men tað verður ikki heilt enn. Guðrum veit heldur ikki, hvørji løg verða á plátuni.

Og hon veit heldur ikki, hvat heldur ikki, hvat slag av tónleiki verður á fløguni, tí henni dámar allan møguligan tónleik. Alt hetta eru viðurskifti hon skal tosa við fyrireikararnar um í næstum.

Annars væntar hon at fáa fleiri løg sendandi, tí síðani hon ver vorðin kend, eru tað nógvir lagsmiðir, sum hava hug at senda henni løg so at teir eisini sjálvir kunnu koma sær fram.

## Tvøroyri ov gott at fara frá

Vit spurdu eisini Guðruna um endin verður so, at hon heilt flytir niður?

– Tað ætli eg at gera alt, sum eg kann fyri at sleppa undan. Eg trívist ov væl á Tvøroyri og tað, eg havi her, er ov gott at fara frá, bæði familjan, vinfólkini og bygdin sum heild.

So tað er greitt, at tað verður nógv ferðing aftur og fram so 10 túra kortið, hon fekk frá Atlantsflogi, verður skhótt uppi.

– Men tað er eisini greitt, at tað verða long tíðarskeið, har er verið burturi, men eg komið so altíð heimaftur inn ímillum, so nógv eg kann, sigur hon.

- Í øllum førum verður tað ringt at flyta. Hvussu trupult tað er, havi eg ikki hugsað um, fyrrenn nú er standi í teirri støðu, at eg skal velja.

Eg havi lisið onkustaðni, at virðislønin,sum tú hevur fingið fyri at vinna kappingina er verd einar tvær milliónir, varð hon gjør um til pening. Hevði tú heldur bara viljað havt peningin og so gloymt alt annað

– Hatta var ein ringur spurningur. Men eg hevði so ikki hildið uppat at sungið. Men hevði eg havt tvær milliónir, hevði eg kanska havt ráð til at givið eina fløgu út sjálv.



*– Eg vil fegin varðveita alt, sum eg havi á Tvøroyri, bæði familju og vinir og eg vil fegin verða verandi tann eg eri, tí tað er slett ikki mín stílur at vera fín uppá tað, sigur Guðrun Jacobsen, sum longu er farin av aftur landinum og til arbeiðis*